# Sámal og Helgi eru ikki við



*Helgi L. Petersen varð skaddur í dystinum móti Liktenstein, og hevur bert verið hálvan tíma á vøllinum síðani. Hetta mettu landsliðsvenjararnir helst vera ov lítið, og saman við Sámal Joensen varð hann í evstu løtu sáldaður frá landsliðshópinum*

**Burtursæð frá málverjuplássinum tykist bara ivi vera um eitt pláss úti á vøllinum á førloyska liðnum, sum leygardagin skal ímóti Skotlandi**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Fyrrapartin í gjár fór fótbóltslandsliðið undir fyrireikingar til fyrstu uppgávuna í EM-undankappingini. Henrik Larsen, landsliðsvenjari, hjálparmenninir hjá honum og teir átjan úttiknu spælararnir hittust á Svangaskarði, har allar venjingarnar verða, og har dysturin verður leygardagin klokkan 15.

Landsliðsvenjarin var á Svangaskarði týskvøldið, tá B68 og B36 spældu. Eftir dystin høvdu hann og hjálparvenjarin, Jógvan Martin Olsen, fund, og tá varð avgerð tikin um, hvørjir skuldu sáldast frá fyri at fáa bruttoliðið niður á átjan spælarar.

Sámal Joensen úr GÍ og Helgi L. Petersen úr NSÍ fingu týskvøldið at vita, at tað í fyrstu atløgu ikki er brúk fyri teimum. Allir spælararnir eru tøkir, men um onkur av teimum átjan verður skaddur undir fyrireikingunum, so er upplagt, at tað verður annar av teimum, sum í fyrstu atløgu eru sáldaðir frá, ið verður innkallaður.

Helgi L. Petersen spældi ein hálvan tíma, tá landsliðið fyri tveimum vikum síðani vann 3-1 á Liktenestein. Helgi noyddist at taka seg úr dystinum, tí hann var skaddur. Síðani hevur hann vant eina ferð, og mánakvøldið spældi hann ein hálvan tíma á Skála. Tað man landsliðsvenjarin hava mett vera ov lítil fyrireiking til stóru avbjóðingina ímóti Skotlandi.

Sámal Joensen var ikki við í hópinum ímóti Liktenstein. GÍ spælarin varð tá skaddur undir venjingunum, og tó at hann var um at koma fyri seg, so var hann ikki millum teir seinastu 18. Nú fall hann í hørðu kappingini um miðvallarplássini. Har kappaðist hann við Julian Johnsson, Fróða Benjaminsen, Jákup á Borg, Rógva Jacobsen, Hjalgrím Elttør, Heðin á Lakjuni og so John Petersen, sum bæði er evni til miðvøllin og álopið.

### Lítið at ivast í

Størsti spenningurin undan landsdystunum er altíð, hvussu liðið fer at síggja út. Tann spurningurin fer at verða vendur og snaraður fram til leygardagin, men hesa ferð tykist tað bara at vera ivi um tvey pláss. Annað er, um tað verður Jákup Mikkelsen ella Jens Martin Knudsen, sum fer at verja málið. Hóast Jákup ikki er á besta liðnum í Molde, so tykist hann vera væl fyri. Jens Martin hevur ikki verið betri, enn hann er nú, og hann hevur átt sín stóra leiklut í, at NSÍ er oddalið í landskappingini.

Hitt ivasama plássið er ytsta miðvallaplássið í vinstru. Til tað plássið tykjast tað vera fýra møguleikar – tveir úr KÍ og tveir úr HB. Hjalgrím Elttør segðist vera ætlaður til plássið móti Liktenstein, men hann varð skaddur. Heðin á Lakjuni er eitt evni, og tað eru Rógvi Jacobsen og kanska Andrew av Fløtum eisini.

Dysturin ímóti Liktenstein og avrikini síðani gera, at liðið ivaleyst fer at síggja soleiðis út: ??? – Pól Thorsteinsson, Jón Rói Jacobsen, Óli Johannesen, Jens Kristian Hansen – Jákup á Borg, Fróði Benjaminsen, Julian Johnsson, ??? – John Petersen, Christian Høgni Jacobsen

Í Býin

RIO BRAVO
Tlf 319767
RESTAURANT
Uni Debes, Kolbein og Brandur Jacobsen
RIO BRAVO
Tlf 319767
RESTAURANT
Sverrisgøta • Tórshavn
Tlf 31 97 67

HESA VIKUNA
Hóskvøldið
Ókeypis atgongd millum kl. 21-22
DJ Kristin Jensen
Fríggjakvøldið
Ladies night kl. 23.00 -01.00
DJ Martin Kjærbo
Leygarkvøldið
DJ Frisko
Alt vikuskiftið
Allar eindir kr. 14,95
Caféin í Club 20 er opin:
Hósd. 17-24, fríggjad. 17-04,
leygard. 14-04, sunnud. 14-24
Discoteque er opið:
Hósd. 21-24, fríggjad. 23-04,
leygard. 23-04
Discoteque
Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo



Í Býin

Hafnia Lounge
Livandi tónleikur hvørt vikuskifti
Sunnudag - hósdag
Opið kl. 17.00-24.00
Servering steðgar kl. 23.30
Fríggjadag & leygardag
Opið kl. 17.00-01.00
Servering steðgar kl. 00.30
HOTEL HAFNIA
Tlf. 31 32 33
Fax 31 52 50

Fríggjakvøldið
- dyrnar lata upp kl. 22
Double up 22-24
Ókeypis atgongd til kl. 24
Diskotek
v/ Kristian
Leygarkvøldið
- dyrnar lata upp kl. 22
Ókeypis atgongd til kl. 24
Ladies night til kl. 01
Diskotek
v/ Peter
BAROK

Felagið Tórshøll
Í vikuskiftinum spæla
Sølva og Bergmenn
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er
livandi tónleikur
Sjavskapping
sunnudagin kl. 15.00
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

fk Mat-seðilin
Hósdagin 5. sept.:
Stokt flesk
Fríggjadagin 6. sept.:
Beef steak
Leygardagin 7. sept.:
Lambasteik
Mánadagin 9. sept:
Bollar í karry
Týsdagin 10. sept.:
Kalkun snitsel
Mikudagin 11. sept.:
Lambafrikassé
***
Seinnaparts-
TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 23,00
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 28,00
Matstovan
í Hoyvík

Kaggin
Hóskvøldið spæla
Ókeypis atgongd
Kim Hansen og James Olsen
Fríggjakvøldið spæla
Black Birds
Double up 22-23 - Ókeypis atgongd áðrenn kl. 01.00
Leygarkvøldið spæla
Black Birds
Fótbóltur á stórskíggja
KAGGIN
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Hýra bil
- ring 311234
BENZIN
DIESEL
KIOSK
AUTO
311234

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið :
• Vetsm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vetsm. kl. 00.30
• Vetsm.-Tórsh. kl. 03.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.30
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 286254

Fremmandar ATR-verður í Eysturoynni
120,-
ALL THAT RAIN
Leygardag 7. september 2002
WUZZURIN
KONSERT & DANSUR
Í MENTANARHÚSINUM
í FUGLAFIRÐI
SirDrinkalot
www.allthatrain.com
SPASSI & ATR-GIMPURIN
BUSS-SAMBAND
Úr Steinatúni 22:30
Av Toftum 23:00
Av Strondum 23:00
Restorffs
FAXE KONDI

petur & petur • 320870
fríggjakvøldið 06/09
DJ Ottar í Funningsstovu
Konufólk ókeypis atgongd
áðrenn kl. 01.00
leygarkvøldið 07/09
DJ Ottar í Funningsstovu
TILBOÐ: sí www.platform.fo
sí www.platform.fo
PLATFORM
discoteque